# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt spennandi eksperiment – og tann 17. maðurin

Beint sum kyndilsmessusamgongan varð skipað, hoyrdu vit um tann sokallaða seytjanda mannin. Í síðstu viku var tað Finnur Helmsdal, sum loysti frá posabandinum, tí hann ikki kundi funnið upp á at bundið seg til ikki at viðgera tey sokallaðu etisku málini, tí hetta skuldi vera eitt krav frá Miðflokkinum.

Tað tykist løgið, um Miðflokkinum hevur eydnast at binda sínar samgongufelagar niðri hesum málum viðvíkjandi næstu fýra árini. Hinvegin, so er tað einki sum bendir á, at Føroyar eru klárar til hvørki fría fosturtøku ella til skrásett parlag, hóast vit við vissu kunnu siga, at tað er bæði natúrligt og logiskt, at slíkar lógir verða settar í gildi í Føroyum. Kortini fara helst bæði hetta valskeiðið og tað næsta við at ganga, áðrenn føroyingar eru klárir til tess. So her talar tíðin søk Miðfloksins.

Í dag er Sandoyartunnilin á breddanum. Fíggjarmálaráðharrin sigur, at tunnilin verður raðfestur eins og allar aðrar íløgur, og at tað als ikki er vist, at byrjað verður upp á tunnilin í september næsta ár, so sum sagt hevur verið – og soleiðis, sum undanfarna løgting samtykti. Ein løgtingslóg kann sjálvandi broytast.

Sum vera man ressast sandoyartingmenninir við av slíkum úttalilsum – men tað fer so at vísa seg, um teir kunnu vísa seg sum menn í hesum máli. Hava teir politiskt tev, so megna teir at telva seg fram, hóast tað kann føra til, at tunnilin verður útsettur eina tíð. Ein so stór íløga má sjálvandi gerast við fyriliti.

Tað fer so eisini at vísa seg, um tann seytjandi maðurin fer at spreingja hesa samgonguna. Hetta er í rættiliga stóran mun ein spurningur um, hvussu serliga teir báðir floksformeninir, Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal megna at samstarva og at halda skil á flokkunum. Eisini hvussu Annita á Fríðriksmørk og John Johannessen sum leiðarar flokkanna á tingi megna at reka parlamentariska grundarlagið hjá samgonguni.

Í øllum førum, so er hendan samgongan eitt spennandi eksperiment. Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi eiga at kunna samstarva um nógv skilagóð mál – og tað eru hesi málini sum skulu raðfestast fram um smálutirnar.

**Sosialurin**

## Føroya dýrasta tíðindasending

JENIS AV RANA



Soleiðis hugsaði eg, tá útvarpsverturin leygardagin var liðugur við spurningar sínar um uppskotini, ið teir tríggir andstøðuflokkarnir hava klár at leggja fyri Løgtingið.

Beinleiðis í landskassan eftir peningi til vinnuna, og inntøkurnar frá tunnlinum skulu ikki í felags kassan, men beinleiðis til tey fáu. Byrja við knøppum tveimum milliónum í fyrsta uppskotinum (løn undir fráveru vegna sjúku hjá børnum), men við undirsjóartunnilsuppskotinum økist ferðin, og milliónirnar gerast skjótt 600-700.

Fyri neyðini at landskassin og fíggjarviðurskifti landsins annars komu í tryggar hendur eftir valið! Framyvir verður hvør króna raðfest! Raðfest til tey, hvørs lívsleið háttaði seg so, at teimum tørvar hjálp og stuðul. Veik, sjúk, tey av ymiskum orsøkum skerd, gomul, børn v. m. Og til samfelagsútbyggingar, herímillum eisini vegir og tunnlar til økir, sum bert kunnu yvirliva og mennast við dagførdari farleið.

Tey, ið fáast við at spekulera í krónum og oyrum mugu brúka aðrar kassar enn landskassan. Og kenni eg tey rætt, so hava tey neyvan nakað ímóti tí.

p. s. Annars fegnist eg um, at uppskotið um løn undir fráveru vegna sjúku hjá børnum eigur fleiri vinir. Eg royndi á ólavsøku 2006, tá atkvøddu Kári fyri, hinir ímóti.

## Hava tit nakrantíð hugsað...

JÓGVAN E. ÓSÁ



Ja, ja, nú skal HANN – heldur onkur – nú hevur hann hugsað –og so skal hann sjálvandi siga øllum frá tí, at tær fáu heilacellurnar eru farnar í sving.

Men hava tit nakrantíð hugsað um, hvussu deiligt og sosialt tað er eitt nú at hyggja at einum fótbóltsdysti.

Óiva er tað tað sama galdandi í øðrum ítróttargreinum – haldi meg minnast okkurt tílíkt í svimjing, fyri umleið 20 árum síðan.

Nú havi eg ikki áhuga í flogbólti – hondbólti, osv, men tað er óiva tað sama galdandi har.

Tað eg her hugsi um er, at vit verða øll "javngomul", tá ið vit hyggja at einum fótbóltsdysti.

Abbasonurin, ið er 4 ár, hevur sama áhugamál, sum systkin, pápin, mamman, abbin – og kanska langabbin, hóast hann t. d. er 84-ára gamal.

Vit blíva øll líka "býtt" – tað einasta tað snýr seg um er, at vit fáa mál – og vinna. Og her hevur aldurin onki at siga.

Vit verða øll líka glað – og líka kedd, tá ið tað um okkar lið tað ræður.

Og meðan dysturin verður leiktur – eru vit øll "javngomul". Tann lítli pilturin rópar – og er líka áhugaður og spentur , sum tann gamli.

Deiligt. Praktfult, at verða "javngamal" við øll eina løtu.

Og aftan á dyst eru vit øll líka glað – og líka kedd – óansett aldur.

Hettar er tað mest praktfulla sosiala tiltak, ið finst.

Bert nakrir fáir tankar, nú heilacellurnar fóru í gongd eina løtu.

PS. Vil tó viðganga, at tað kann verða nokk so stravið viðhvørt at halda við KÍ og Liverpool.

## Endurnýggja motorar á Sundi fyri 18.5 mió. kr.

*Tíðindaskriv*

Seinnapartin í gjár skrivaðu leiðslan í SEV og leiðslan í Burmeister & Wain Scandinavian Contractor A/S undir ein sáttmála um endurnýgging av eltekniska útbúnaðinum til báðir teir stóru MAN B&W motorarnar á Sundsverkinum.

Motorarnir, ið ávikavist vóru uppsettir í 1983 og 1988, skulu eftir ætlan koyra í minst tíggju ár afturat ella 50.000 tímar, men hetta heldur eltekniski útbúnaðurin ikki til. Tí verður farið undir hetta arbeiði, ið eftir ætlan skal vera liðugt í august 2009.

Talan er í høvuðsheitum um útskiftan av láspenningstalvum í station 2, alarmskipan, last- og spenningsregulatorum, pumpustýringum og yvirskipaðu stýriskipanina. Eisini verður onnur útgerð á Sundsverkinum tengd at somu skipan, soleiðis at tað framyvir verður ein yvirskipað stýriskipan fyri alt elverkið á Sundi.

Arbeiðið er lagt soleiðis til rættis, at tað minst møguligt darvar dagliga raksturin á Sundsverkinum. Eisini er hædd tikin fyri, at motorarnir skulu vera tøkir í tí tíðarskeiðnum, tá ið lítið vatn er til vatnturbinurnar.

Arbeiðið upp á tann fyrsta motorin byrjar í september 2008, og verður eftir ætlan liðugt í februar 2009. Síðan verður farið undir tann næsta motorin og felagsútgerðina, sum skal vera liðugur fyrst í mai 2009.

Seinasta stigi í arbeiðinum er at savna báðir teir nýggju MaK motorarnar í somu stýriskipan, og verður hetta arbeiði liðugt í august 2009.

Kostnaðurin fyri samlaða projektið er umleið 18.5 mió. kr.

Til staðar á fundinum, tá ið sáttmálin var undirskrivaður, vóru Christian Grundtvig og Søren Ebbe Sørensen frá BWSC og Leivur Hansen, Hákun Djurhuus, John P. Danielsen, Finn Jakobsen, Terji Nielsen, Bergur Didriksen, Jákup Sørensen, Klæmint Weihe og Ingeborg Godtfred umboðandi SEV.

**SEV**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.